Úrskurður Ítróttadómstólsins

viðvíkjandi kæru frá ÍF-Flogbólti

um úrskurðin hjá dómsnevndini hjá Flogbóltssambandi Føroya

Ítróttadómstólurin hevur viðgjørt kæru frá ÍF-Flogbólti, dagfest 13. februar 2020, um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Flogbóltssambandi Føroya, dagfest 8. februar 2020 viðvíkjandi útlendskum leikara, ið hevur spælt við Mjølni kappingarárið 2019/2020. ÍF-Flogbóltur kærir allar dystir hjá Mjølni kappingarárið 2019/20 og vísir í hesum sambandi á, at Mjølnir hava nýtt leikara, ið ikki hevur havt ítróttarvisum ella arbeiðsvisum í lagi og tískil ikki hevur havt loyvi at luttaka í dysti fyri Mjølnir.

Í viðgerðini í Ítrótttadómstólinum hava 5 nevndarlimir luttikið: Anna Rein, formaður, Eyðhild Skaalum, næstformaður, Jóhan Lamhauge, Børge B. Hansen, og Magnus Dam, nevndarlimir.

Semja er millum limirnar í Ítróttadómstólinum um, at allir limir eru gegnigir at viðgera kæruna.

Kæran er innkomin rættstundis til Ítróttadómstólin.

Grundarlagið undir viðgerðini av kæruni:

- Kæra frá ÍF-Flogbólti til Flogbóltssamband Føroya, dagfest 3. februar 2020
- Avgerðin hjá Flogbóltssambandi Føroya, dagfest 4. februar 2020
- Kæra frá ÍF-Flogbólti til Dómsnevndina hjá Flogbóltssambandi Føroya, dagfest 7. februar 2020
- Úrskurður hjá Dómsnevnd Flogbóltssambands Føroya, dagfestur 8. februar 2020
- Kæra frá ÍF-Flogbólti til Ítróttadómstólin, dagfest 13. februar 2020
- Lógir og reglur Flogbóltssambands Føroya
- Lógir og reglur Ítróttasambands Føroya
- Reglugerð fyri Ítróttadómstól ÍSF
- Útlendingalóggáva í breiðari merking

**Málslýsing**

Innleiðandi kann upplýsast, at í sambandi við viðgerðina hjá Ítróttadómstólinum, hevur Ítróttadómsstólurin biðið Flogbóltssamband Føroya um viðkomandi upplýsingar og sent áheitan til Dómsnevndina hjá Flogbóltssambandi Føroya um at útflýggja viðkomandi skjøl í málinum. Harumframt hevur Ítróttadómstólurin sent skrivligar uppfylgjandi spurningar til Mjølnir.

ÍF-Flogbóltur kærir Mjølnir fyri at hava nýtt ein leikara ólógliga við uppáhaldi um, at viðkomandi hvørki hevur havt ítróttarvisum ella arbeiðsvisum í lagi, og tískil ikki hevur havt loyvi til at luttaka fyri Mjølnir. Kært varð um allar dystir hjá Mjølni í kappingarárinum 2019/2020.

Í avgerð 4. februar 2020 staðfestir Flogbóltssamband Føroya, at einki brot er framt, og eingin sekt skal verða ásett ella givin. Avgerðin er grundað á, at Flogbóltssamband Føroya ongar ásetingar hevur viðvíkjandi

uppihaldsloyvi, arbeiðsloyvi ella nørkum slíkum, áðrenn leikaraloyvi kann verða givið.

ÍF-Flogbóltur kærir avgerðina hjá Flogbóltssambandi Føroya til Dómsnevndina hjá Flogbóltssambandi Føroya.

Í úrskurði 8. februar 2020 staðfestir Dómsnevndin hjá Flogbóltssambandi Føroya avgerðina hjá Flogbóltsambandi Føroya. Í úrskurðinum vísir dómsnevndin á, at ongar ásetingar um arbeiðs- og uppihaldsloyvi hjá útlendskum leikarum, ið leika í føroysku landskappingini í flogbólti, eru í kappingarreglunum hjá Flogbóltssambandi Føroya. Dómsnevndin hjá Flogbóltssambandi Føroya metir, at tá ið ongar reglur eru at taka støðu út frá, ber ikki til at taka støðu í málinum. Dómsnevndin heitir á Flogbóltssamband Føroya um at taka málið upp við Ítróttasamband Føroya (ÍSF), so greiða fæst á, nær útlendskir leikarar kunnu spæla í føroyskum kappingum.

Úrskurðurin hjá dómsnevndini hjá Flogbóltssambandi Føroya kemur sostatt fram til, at tað ikki ber til at taka støðu í málinum.

ÍF-Flogbóltur kærir úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Flogbóltssambandi Føroya til Ítróttadómstólin við somu grundgeving, ið førd varð fram í kæruni til Dómsnevndina hjá Flogbóltssambandi Føroya: at hóast vitandi um, at ongar reglur viðvíkjandi ítróttaligum virksemi hjá útlendskum leikarum eru at finna hvørki hjá Flogbóltssambandi Føroya ella hjá ÍSF, mugu landsins lógir vera galdandi.

Í høvuðsheitinum snýr kæran frá ÍF-Flogbólti seg um, at ÍF-Flogbóltur metir, at tá ongar reglur eru ásettar í lógarverkinum hjá Flogbóltssambandi Føroya ella hjá ÍSF, má regluverkið viðvíkjandi útlendskum leikarum í ítróttarligum høpi verða grundað á galdandi lóggávu um arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

**Ítróttadómstólurin skal viðmerkja**

Ítróttadómstólurin leggur til grund eina meginreglu um, at alt ítróttarvirksemi, ið fer fram í regi av ÍSF og sersambondum tess, eigur, umframt at vera í samsvari við viðkomandi reglur í ÍSF og/ella viðkomandi sersambandi, at fara fram í samsvari við galdandi lóggávu í Føroyum.

Í hesum kærumáli snýr spurningurin seg um, hvørt ítróttaligt virksemi hjá viðkomandi útlendska leikara er farið fram í samsvari við galdandi lóggávu um arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

Ítróttadómstólurin hevur ikki heimild at taka avgerðir í málum, hvørs lóggáva hoyrir undir sivilu myndugleikarnar í Føroyum. Ítróttadómstólurin hevur tískil ikki heimild at taka støðu til ella avgera, hvørt útlendski leikarin hevur havt lógligt uppihald í Føroyum.

Soleiðis sum málið er upplýst fyri Ítróttadómstólinum, metir Ítróttadómstólurin ikki, at tað kann leggjast til grund í viðgerðini av kærumálinum, hvørt útlendski leikarin, í tíðarskeiðinum, hann hevur leikt dystir í skipaðari kapping fyri Mjølnir, hevur uppihildið sær lógliga ella ólógliga í Føroyum.

Tað finnast ongar ásetingar í reglunum hjá ÍSF ella hjá Flogbóltssambandinum, ið áseta mannagongdir, ið hava til endamáls at tryggja, at viðkomandi treytir í útlendingalóggávuni eru loknar, áðrenn útlendskur leikari fær loyvi at luttaka í skipaðum kappingum í Føroyum undir ÍSF ella sersambondum tess.

Ítróttadómstólurin skal viðmerkja, at hetta mál sýnir, at tað er ein trupulleiki, at slíkar reglur ikki eru ásettar í evstu reglunum hjá ÍSF og øllum sersambondum tess. Ítróttadómstólurin fer tí at heita á ÍSF og

sersambond tess um at skipa soleiðis fyri, at farið verður undir at fáa neyðugar reglur og mannagongdir hesum viðvíkjandi, ið tryggja, at hesar altíð eru í samsvari við sivila lóggávu á økinum

**Úrskurður**

Vísandi til frammanfyristandandi, har staðfest verður, at Ítróttadómstólurin ikki hevur grundarlag fyri at staðfesta brot á reglur hjá ÍSF ella Flogbóltssambandi Føroya, gevur Ítróttardómstólurin ikki ÍF-Flogbólti viðhald í kæru síni. Avgerðin hjá Dómsnevndini hjá Flogbóltssambandi Føroya, dagfest 8. februar 2020 verður tískil staðfest.

Tórshavn 25. februar 2020

Anna Rein Eyðhild Skaalum

Børge B. Hansen Magnus Dam Jóhan Lamhauge